ítróttur

Nr. 117 • mikudagur • 25. juni 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Hoyvíkingar hugsa um 10–mannafar

Um hugsanin at smíða Hoyvíking skal gerast til veruleika, so skulu felags viðurskiftini og umstøðurnar at eiga og reka kappróðrar fáast upp á pláss fyrst, heldur royndur kappróðrarmaður í Hoyvík

KAPPRÓÐUR
Jóannes Hansen

Gongst sum hoyvíkingar ætla, so verður talan um nýggjan luttakara í 10-mannafarsróðrinum innan alt ov langa tíð

Mynd: Álvur Haraldsen

Tað hevur eftir øllum at døma vakt miklan ans, síðani tað eftir norðoyastevnu varð nevnt á ítróttarsíðunum her í blaðnum, at H71 spælarar fyrst tað nógva manna 8–mannafarið hjá Havnar Róðrarfelag, Ørv, sum hevur verið so sera sannførandi higartil. Í hvussu so er, hevur tað fingið nógva umrøðu, at hoyvíkingar á henda hátt eru við í kappróðrinum.

Enn er einki kappróðrarfelag í Hoyvík, og tað hevur ikki eydnast at fingið nakað at vita um, at teir hava ítøkiligar ætlanir um at stovna kappróðrarfelag ella at gera kappróðrardeild í H71. Men hugsanin um at Hoyvíkin skuldi átt sítt egna 10–mannafar, Hoyvíkingin, og at hann skuldi tikið lut í FM kappingini, hevur leingi spøkt. Og nú tað hevur gingið so sera væl hjá H71 spælarunum umborð á Ørvi, er hetta prátið aftur komið undan kavi í Hoyvík.

– Okkara rógvarar eru við einum 8–mannafari, sum hoyrir til Havnar Róðrarfelag. Tað er hugaligt at vita, at teir standa seg væl. Men tað er ein sannroynd, at kappingin millum 8–mannaførini er, um tað verður sammett við fótbólt, ikki meiri enn 2. deild. Í fótbólti gongur tað fyri seg í 1. deild, og í kappróðri eru tað 10–mannaførini, sum tað snýr seg um. Bæði í bátastøðd og ikki minst fyri samleikan hjá okkum í Hoyvík, hevði tað verið uppaftur hugaligari, um vit høvdu átt okkara egna 10–mannafar. Tað er tí, at hetta prátið aftur er komið fram, sigur ein hoyvíkingur, sum ynskir at vera ónevndur.

Skal nógv til

Halgir Dahl-Olsen er bátsformaður umborð á 8-mannafarinum Ørvi. Hann er ein av stuðlunum á hondbóltsliðnum hjá H71 í 1. deild, og hann hevur áður róð við Havnarbátinum. Tá ið vit biðja Halgir gera viðmerkingar til søguna, sum er nevnd omanfyri, er hann einki fyri tí. Men hann heldur ikki, at hetta er nakað, sum burturav skuldi fingist róð við neyðugt við nýggjum fólki at tikið sær av rakstrinum. Tað ber ikki til at brúka nógva tíð og orku upp á venjing og kappróður og samstundis at hava ábyrgdina av felagsrakstri, sum hevði kunnað verið til veruleika nú beinanvegin.

– Eg ivist ikki í, at tað hevði verið figgjarligt grundarlag at latið eitt 10–mannafar smíðað. Hoyvíkingar eru áhugaðir í ítrótti, og teir taka undir við tí, sum gongur fyri seg í Hoyvík. Tað sæst eitt nú aftur í hondbóltinum. Men tað eru onnur viðurskifti, sum skuldu fingist upp á pláss, áðrenn tað yvirhøvur hevði verið rætt at arbeitt við at fáa 10–mannafar til vega.

Hvørji eru tey viðurskiftini?

– Tað eru viðurskiftini kring sjálvan kappróðurin. Eitt er at fáa ein bát smíðaðan. Men um t. d. H71 hevði gjørt av at luttaka í kappróðri, ella um eitt nýtt felag hevði verið stovnað, verið neyðugt við nýggjum fólki at tikið sær av rakstrinum. Tað ber ikki til at brúka nógva tíð og orku upp á venjing og kappróður og samstundis at hava ábyrgdina av felagsrakstri, at fáa neyst upp á standa, at syrgja fyri ferðingini og øllum hinum, sum skal til. Um hoyvíkingar nú høvdu latið 10–mannafar smíðað, so kvígi eg fyri, at tey somu høvdu staðið fyri øllum hesum uppgávunum, og so hevði tað verið so skjótt, at hugurin at venja og rógva hevði verið burtur, og tað er jú hetta, sum tað snýr seg um, heldur Halgir Dahl-Olsen.

Samleikin

Hoyvíkin er vorðin eitt tað størsta plássið í landinum. Har er felags skúli, ítróttarhøll, hondbóltsfelag og aðrir felagsskapir síggja so við og við dagsins ljós.

Upprunaliga var H71 eitt fótbóltsfelag. Dreingirnir spældu fótbólt á fløtuni niðri í Hoydølum, men talan er gjørdist ongantíð um skipaðan fótbólt í landskappingunum. Har er tað framvegis soleiðis, at hoyvíkingar spæla í B36 og HB og kanska eisini í øðrum feløgum. Í hondbóltinum er tað øðrvísi, og síðani ítróttarhøllin kom, eru møguleikarnir hjá teimum mongu áhugaðu betraðir.

– Enn er samleikin í økinum ikki so kjølfestur. Í hvussu so er ikki hjá øllum. Hjá teimum, sum eru fødd og uppvaksin í Hoyvík, er eingin ivi um, at tey eru hoyvíkingar og ikki havnarfólk, og í hvussu so er hjá hesum hevði tað verið nógv hugaligari, um okkara kapprógvarar vóru umborð á okkara báti. Men tað eru nógvir tilflytarar úr Havnini. Nógvir teirra síggja framvegis seg sjálvar sum havnarfólk, og tað er einki at siga til tað. Men vit ivast ikki í, at hoyvíkssamleikin fer at styrkjast, sigur hoyvíkskeldan, sum ynskir at vera ónevnd.

Hoyvíkingar hava áður mannað onkrar kappróðrarbátar. Eitt nú hava dreingirnir okkurt árið verið við til at manna Beintu úr Miðvági. Umborð á 8-mannafarinum Ørvi hjá Havnar Róðrarfelag eru seks av níggju monnum úr H71. Fýra spældu hondbólt í 1. deild síðsta vetur, og tveir vóru á unglingaliðnum.

Veruleikin

Kappingin millum 10-mannaførini verður av róðrarfólkunum og eisini av øðrum, sum fylgja við, sammett við hana í 1. deild í fótbólti. Tí verður tað mett at vera heilt burturvið og sera óheppið fyri áhugan kring alt landið, at tað ikki tykist bera til at manna fleiri enn fýra 10-mannafør.

Ein stórur triðingur av fólkinum í Føroyum býr í høvuðsstaðnum. Tá ið tað tykist so torført at manna 10-mannafør kring landið – eitt nú í Klaksvík og Suðuroy – so kann tað væl hugsast, at um fleiri 10-mannafør skulu mannast, so verður tað í høvuðsstaðarøkinum, har áhugin fyri kappróðri er rættuliga stórur. Argjamenn hava viðhvørt tosað um at manna 10-mannafar, men higartil er hetta ikki vorðið til veruleika. Nú kann tað hugsast, at hoyvíkingar fara at verða teir fyrstu at bjóða av. Undir øllum umstøðum hevði tað verið gott fyri kappingina, um fleiri høvdu verið um boðið í mest áhugaverdu kappingini enn bara fýra manningar. Einki er heldur at ivast í, at hesar manningarnar høvdu heilsa nýggjum kappingarneytum væl komnum, um teir so komu úr Hoyvík ella onkra aðra staðni frá.

Sílið fyri triðju ferð

Tað eru bara vestmannadreingir, sum tykjast hava nakran møguleika at bjóða sannførandi manninginum á Sílinum av

5–MANNAFØR DREINGIR
Jóannes Hansen

Sílið tykist einaráðandi í dreingjaróðrinum, har teir leygardagin vunnu triðja sigurin á rað

Mynd: Álvur Haraldsen

Enn hevur eingin megnað tað, og tað er rættuliga ivasamt, um nakar fer at megna tað. Dreingirnir umborð á Sílinum hava higartil vunnið allar tríggjar FM kappingarnar, og teir hava verið rættuliga sannførandi. Tað vóru teir eisini leygardagin. Á málinum vóru teir meiri enn eina bátslongd frammanfyri kappingarneytarnar.

Higartil hevur eingin staðið Sílinum kurl. Um nakar skal gera tað, so bendir alt á, at tað verða vestmannadreingir umborð á Havfrúnni. Hesa ferð vóru teir saman við Bliki, Tjaldrinum og eisini Fípuni Føgru væl við á fyrstu metrunum. Men tað var skjótt, at Sílið var leyst av Havfrúnni, sum eftir startspurtin ongantíð varð hótt av nøkrum øðrum.

Kappingin gekk fyri seg í fleiri bólkum. At siga at eingin kapping var um fremsta plássið er kanska at taka í so rívan til. Men kappingin var ongantíð tøtt. Sílið var leyst av Havfrúnni, tá ið hálvt málið var rógvið, og munurin gjørdist ongantíð minni enn so.

Havfrúgvin var í sínum lagi ongantíð hótt av aftaru bátunum. Vestmannadreingir vóru í minsta lagið tvær bátslongdir og kanska meiri enn tað fyrri á mál enn Blikur og Tjaldrið, sum kappaðust nógv um triðja plássið. Fípan Fagra, Royndin Fríða og Junkarin vóru í tættari kapping um fimta plássið.

Í fjør vann Sílið FM,og alt bendir á, at dreingirnir hjá Havnar Róðrarfelag eisini fara at vinna hesa kappingina í ár. Tjaldrið vann FM í 2000 og í 2001. Róðrardreingirnir hjá NSÍ eru framvegis ímillum teir bestu, men teir tykjast ikki at hava møguleika at gera nakað sum helst við Sílið. Havfrúgvin vann FM í 1999. Um nakar skal gera nakað við Sílið í ár, so verður tað Havfrúgvin, men tað tykist rættuliga ivasamt, um nakar fer at megna at skala Sílinum.

Argir og Havnin skiftast um

Eftir sigurin í Kollafirði eru tær umborð á Bliki best fyri í kappingini um meistaraskapin, sum argjabáturin við gentumanning ikki hevur vunnið í seytjan ár

5–MANNAFØR GENTUR
Jóannes Hansen

Blikur helt fast í endaspurtinum, soleiðis at eingin ivi skuldi vera um sigurin

Mynd: Álvur Haraldsen

Tað er stórur spenningur í kappingini millum 5-mannafør við gentumanningum. Á Norðoyastevnu vunnu tær umborð á Bliki. Á Fjarðastevnu vann Sílið, sum ikki hevði staðið seg so væl í Klaksvík. Blikur gjørdist nummar tvey á Strondum, og leygardagin var Blikur aftur fremstur. Harvið hava argjagentur syrgt fyri at vera í góðari støðu, nú róðrarárið er knappliga hálvrunnið. Støðan hjá teimum gjørdist uppaftur betur, tí Sílið ikki megnaði meiri enn triðja plássið í Kollafirði. Gentur í Havnar Róðrarfelag taptu kappingina um næstfremsta plássið rættuliga tepurt ímóti Havfrúnni. Tað vóru bara ein ella tvær sponnir á muni.

Sílið legði annars bragdligast fyri. Blikur fylgdi væl við, og Havfrúgvin og Drekin lógu eisini væl fyri eftir startspurtin.

Tá ið knappliga hálvur teinurin var rógvin, legði Blikur seg við síðuna av Sílinum. Munurin minkaði skjótt, og Blikur gjørdist nummar eitt og økti um munin til eina hálva bátslongd og eina løtu til meiri enn tað.

Í endaspurtinum megnaði Blikur at halda tørn um fjarstøðuna til næstu bátarnar. Sílið tóktist leingi skula vinna næstfremsta plássið. Men tær umborð á Havfrúnni vóru rættuliga drúgvar og megnaðu akkurát at trýsta seg framum Sílið.

Fjarstøðan til hinar bátarnar var rættuliga stór. Drekin gjørdist nummar fýra bara eina lítla rong frammanfyri Fípuna Føgru, og so vóru meiri enn tvær bátslongdir aftur til nýggja Firvaldin, sum komandi leygardag fer at royna seg í heimasjógvi. Firvaldur við gentumanning er einasta umboðið fyri Tvøroyri í kappróðrinum í summar.

Sílið vann FM í fjør. Argjagentur umborð á Bliki hava sjálvandi ikki enn kannað sær FM heitið og so langt í frá tí. Men um tað fer at eydnast hjá teimum at vinna FM, so verður tað hugaligt hjá Argja Róðrarfelag. Blikur við gentumanning hevur bara eina ferð áður vunnið FM. Tað var í 1986. Genturnar, sum í ár manna Blik, eru hesar: Joan Mikkelsen – Anna Andresen, Lív Simonsen, Maud Poulsen, Elsa Sørensen, Mayken Petersen, Hallgerð.

Jarnbardur bjóðar seg fram aftur

Gongurólvur var enn eina ferð rættuliga sannførandi, men um tær skulu fáa kapping, so bendir nógv á, at hon fer at koma frá Jarnbardi

6–MANNAFØR KVINNUR
Jóannes Hansen

Tað var um reppið, at Jarnbardur aftur kom fram í oddin, men hesa ferð máttu tær taka til takkar við silvurinum

Mynd: Álvur Haraldsen

Manningin sum í fjør var so sera sannførandi umborð á Sílinum og vann allar róðrarnar er framvegis sigurssæl. Nú eru tær umborð á Gongurólvi, og tær hava vunnið allar tríggjar róðrarnar, sum higartil hava verið. Á Fjarðastevnuni kundi tað kanska hent, at Páll Fangi hevði ætlanir um at bjóða av, og at tað fór at gerast heilt spennandi í Kollafirði, um tað fór at ganga tann vegin, sum tað hevði gjørt síðani Norðoyastevnuna.

Men Gongurólvur var ikki áhugaður í kapping frá teimum úr Klaksvík. Tað var ongantíð soleiðis, at munurin millum fremstu bátarnar var so stórur, at eingin hugsningur var um, at Gongurólvur kundi takast. Men Gongurólvur varð skjótt frammi í oddinum, og í endaspurtinum var eingin ivi. Gongurólvur fór fyrst undir endaspurtin, og á málinum var munurin aftur til teir næstu meiri enn ein bátslongd.

Páll Fangi fekk so mikið stóra kapping um næstfremsta plássið, at hann noyddist at dvína. Jarnbardur, sum var sannførandi FM vinnari í fjør, og sum eisini í 1999 og í 2000 vann FM, var ikki við í tveimum teimum fyrstu FM kappingunum. Hesa ferð vóru tær við, og avrikið og úrslitið kundu bent á, at tað verður meiri at følla frá Jarnbardi í næstu kappingunum. Jarnbardur megnaði við hálvum skuti at vinna á Páll Fanga í kappingini um næstfremsta plássið.

Fleiri av teimum, sum seinastu árini hava verið við Jarnbardi, eru burturi í lestrarørindum, men nú er summarfrítíð, og so ber til at manna bátin.

– Vit gjørdu næstsíðsta sunnukvøld av, at vit skuldu luttaka í Kollafirði. Vit meldaðu til týskvøldið, tá ið tað var síðsta freist. Vit hava bara verið tríggjar ferðir í bátinum og vant. Tí eru vit væl nøgdar við úrslitið, siga tær umborð á Jarnbardi.

Í startspurtinum sást, at tær umborð á Jarnbardi framvegis duga at rógva og vita, hvat kappingin snýr seg um. Tær løgdu seg á odda, og tær vóru eina løtu eina bátslongd frammanfyri hinar bátarnar. Men so gingu kreftirnar undan, Gongurólvur og Páll Fangi tóku seg fram, og so misti Jarnbardur. Men hann misti bara fremsta plássið. Munurin frá Jarnbardi og aftur til Lóm á fjórða plássi var ikki so stórur. Tí kann roknast við, at kappingin fer at vera stór og tøtt næstu ferðirnar.

Enn er Gongurólvur upplagdur favorittur. Um hann skal fáa kapping um fremsta plássið í næstu kappingunum, so man lítil ivi vera um, at kappingin fer at koma frá Jarnbardi, sum í hesi vikuni aftur hevur vant nakrar ferðirnar.